# Stanley – fjølbroytti handilin við Streymin




Tá handilin Stanley við Norðskála lat upp fyri tíggju árum síðani í mei í 1996, var hann partur av øðrum virksemi hjá eigarunum, men nú er tað lagt um, so tað bara umfatar handilsvirksemið.

Í fleiri ár hevur handilin verið í sjálvari bygdini við Norðskála, men fyri tveimum mánaðum síðani flutti hann oman á Svartheygg í nýggjan bygning, sum elementvirkið við Gjógv hevur gjørt. Bygningurin er umleið 600 fermetrar. Sjálvur handilin er umleið 300 fermetrar umframt goymslu, og harafturat eru tvey høli, sum eru tøk til onnur endamál.

Stanley er ein fjølbroyttur handil. Tey selja stutt sagt alt til tað vanliga húsarhaldið - bæði til innandura og uttandura brúk. Har kunnu viðskiftafólkini fáa máling frá Sadolin umframt føroyska máling, øll vanlig búnýti, gávulutir og leikur. Harafturat hava tey amboð til húsbrúk.

Maria Dam, stjóri, sigur, at tann nýggi handilin hevur fingið sera góða móttøku, og tað hevur eisini víst seg, at tað var rætt at byggja nýtt, sigur hon. Handilin er beint norðan fyri brúnna um Streymin og liggur tí sera væl fyri, og harafturat eru umstøðurnar at parkera bilin uttanfyri sera góðar. Tað eru heldur ikki bara fólk úr Sundalagnum, sum koma í Stanley. Tvørturímóti eru tað dagar, tá tað eru fleiri fremmandafólk, sigur Maria Dam, og tað hendir meiri enn so, at fólk koma úr Havn norður á Svartheygg at keypa.

Trý fólk arbeiða í Stanley, men nú upp undir jól hava tey eisini hjálparfólk í handlinum.

Slagorðið í INN
Altíð at hava vøruna, ið tær tørvar!
GOTT
BETRI
BÍLIGARI
opið frá 8.00 til 22.00
inn
Klaksvík · Norðskali · Tórshavn




JÓL Í MIÐBÝNUM
Handlarnir hava opið til kl. 20
Jólamenn vitja í býnum hvønn seinnapart, teir vitja eisini í handlunum í miðbýnum
Tórshavnar Ungdómshornorkestur spælir mánakvøld kl. 18
Týsdagin spælir Frelsunarherurin kl. 17.30 og Glymur syngur kl. 19.
Mikudag koma jólamenn í býin á rossabaki.
fleiri tiltøk eru á www.kunning.fo og www.torshavn.fo
KUNNINGARSTOVAN
Telefon 30 24 25










